# Nøvn

## Føðingar




*Eg eiti Brandur Sigmundarson Brestisson og bleiv føddur 22. august. Eg vigaði 3115 gr og var 51 cm. langur. Foreldur míni eru Elisabeth & Sigmundur Brestisson, Klaksvík.*

8. september fingu Magdalena Joensen og Eyðun Ryggshamar, Fuglafirði, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 3850 gr.

9. september fingu Gudny Helgadóttir og Thorvald J. Petersen, Argjum, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

10. september fingu Anna Sofía Gaard og Jón í Soylu, Argjum, ein son. Hann var 55 cm langur og vigaði 4350 gr.

10. september fingu Gunn Müller og Guðmundur Joensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 52 cm long og vigaði 3590 gr.

11. september fingu Unn og Jógvan Justinussen, Leirvík, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4300 gr.

12. september fingu Karina og Svend Højgaard, Skála, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 4170 gr.

13. september fingu Jackline og Poul Johannesen, Signabø, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3775 gr.

13. september fingu Marjun D. og Jan Erik Jacobsen, Fuglafirði, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3270 gr.

13. september fingu Eja Leunbach Madsen og Valdimar Tjørnudal, Keypmannahavn, eina dóttur. Hon var 40 cm long og vigaði 1600 gr.

14. september fingu Anna Margreta Hansen og Sonhard Dalfoss, Hósvík, eina dóttur. Hon var 51 cm long og vigaði 4050 gr.

# Minningarorð um okkara fitta Róa



Dagurin 25.02.10, byrjaði við einari sólstrálu, tá eg tíðliga fór í skúla. Men ikki vardi sólstrálan longi, tí tann morgunin fekk eg tey tungu boð um at okkara fitti Rói knappliga var tikin frá okkum.

Tú vart sanniliga ein sólstrála, góði Rói. Tað vóru fáðir dagar, har tú ikki komst heim til okkum við einum stórum smíli á andlitinum, sum eisini fekk okkum øll at smílast. Tað var altíð stuttligt at fáa teg inn.

Eg síggi teg fyri mær, har tú stendur við skúlatasku á rygginum, og spyr um eg eri klár. Tú hevdi altíð tína meining og tínar planir. Tú elskaði náttúruna og legði onki í um tað var vátt ella turt úti.

Eg minnist so væl einaferð, tað var ringt veður, bæði vindur og regn. Mín hugur til túr úti í regni, var ikki heilt til staðar, so eg royndi at finna upp á okkurt annað enn at fara út, tá hugdi tú upp á meg sum um eg var býtt og spurdi um eg ikki var "vatntøtt" ella hvat. So eg var noydd at fara út, og tá ráhyggaði tú tær.

Tú vart sera skemtiligur og dugdi væl arga meg. Eisini plagdu vit at arga Duritu, Jákup Martin og Evu við at snýta tey í Ludo, tá livdi tú virkuliga mitt í verðini. So ein kúllur búði eisini aftanfyri titt blíða lyndi, men soleiðis skal tað eisini vera.

Tá vit gingu túr, ella bara hugnaðu okkum úti í náttúruni, hevði tú ofta nógv gott at fortelja. Tað var mangan eg hugsaði um alt tú segði. Tú fekst ofta mínar tankar á annað spor. Tú lærdi meg virkuliga at vera glað fyri livið og takka fyri tað vit hava.

Eg eri glað fyri at jesupápi lat okkum lána teg, men eg haldi hann kundi bíða eitt sindur við at taka teg aftur. Skilji hann tó væl, tí einum so fittum eingli skal man leita longi eftur. Eg veit hvar tú ert farin góði Rói, og eg eri sikkur í, at tú hevur tað gott

Takk fyri alt tú hevur lært okkum. Vit sakna teg !

*Í dreymaland brátt tú fert inn.*
*Við brosið og rósum á kinn.*
*tú droymur um einglar og jól,*
*um stjørnurnar mána og sól.*
*Leikar á grønari ong, Jesus signi mín drong.*
*Sov lítli vinur sov nú.*

**Tóra v/ familju**

# Hergerð í Smiðjuni



*Listakvinnan Hergerð Joensen í Smiðjuni*

Fríggjadagin 17. september letur ein málningaframsýning hjá listakvinnuni Hergerð Joensen upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Hergerð málar bæði naturalistiskt og abstrakt. Í fleiri ár hevur hon luttikið á listaskeiðum í Danmark. Hergerð hevur luttikið við málningum sínum á framsýningum saman við øðrum og havt fleiri sjálvstøðugar framsýningar. Hon hevur egið atelier, har hon brúkar tað mesta av síni tíð til málningalistina.

Framsýningin er opin til og við týsdagin 21. september. Opið verður fríggjadagin frá kl. 16–19, leygardagin frá kl. 10–18 og sunnudagin, mánadagin og týsdagin frá kl. 15 – 18.

# Merkisdagar

**Gullbrúdleyp**
Fríggjadagin 1. oktober hava Elisabeth og Jógvan Andreassen verið gift í 50 ár. Tey hava henda dagin frá kl. 11 til 15 opið hús í heiminum Varðagøta 60, har tey, sum hava hug at koma at heilsa upp á gullbrúðarparið, eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
20. september verður Poul Isaksen á Stongunum í Klaksvík 80 ár. Hann verður burturstøddur.

**80 ára føðingardagur**
Sunnudagin 12. sept. fylti Petur Danielsen, Hósvík, 80 ár. Dagurin verður hildin 23. sept. á Giljavegi 40, frá kl. 18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**80 ára føðingardagur**
Fríggjadagin 17. sept. verður Tórgerð Høgnesen, Klaksvík, 80 ár. Dagurin verður hildin kl. 18 í Emmaus.

**75 ára føðingardagur**
Mánadagin 20. sept. fyllir Tórfinnur Hansen, Skála, 75 ár. Hann er burturstaddur føðingardagin.

**70 ára føðingardagur**
Leygardagin 18. sept. fyllir Emly Vestergaard 70 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 11 til 16.

**70 ára føðingardagur**
Sunnudagin 19. sept. fyllir Sámal E. Debes, Oyri, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, Millum Gilja 52, Hoyvík, frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**70 ára føðingardagur**
Mánadagin 20. sept. verður Samulina Jóhannessen, Kolbeinagjógv, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá Katrinu og Meinhard frá kl. 17.

**70 ára føðingardagur**
Mikudagin 22. sept. fyllir Selma Norðgerð, Leirvík, 70 ár. Dagurin verður hildin hjá dóttrini, millum Svalir 9, Leirvík, frá kl. 17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**60 ára føðingardagur**
Leygardagin 18. sept. verður Rúna Berghamar í Havn 60 ár.